# Fríhandilin Rusland-Føroyar, G8 og WTO



*Putin vil hava Rusland á ovastu rók, men WTO limaskapurin má bíða.*

**G8 fundur hevur júst verið á fyrsta sinni í Ruslandi. Rusland var jú landið, sum víðkaði bólkin frá G7 til G8. G8 fundirnir fáa ofta nógva umrøðu, og serliga í fjør tá Bretland og Tony Blair settu øll segl til og bæði Bob Geldorf og Bono gjørdu sítt fyri at fólksliggera henda ríkalandafundin við at seta fátækradømi á skrá aftur.**

KRONIKK
*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*

### Miðeystur

Ikki kann sigast, at so nógv var gjørt við henda fundin í heimspressuni, ið eisini bleiv raktur av ófriðinum í Miðeystri sum eisini krevur at hesi heimsins lokomotiv taka støðu til kreppuna í Miðeystri. Fleiri av hesum londunum jú eisini sita sum fastir limir í trygdarráðnum í ST. Nógv orka fór tí eisini við at semjast um eina yvirlýsing viðvíkjandi Miðeystri.

### WTO limaskapur

Rusland ætlaði at brúka fundin sum møguleikan at fáa WTO limaskapin undir land. Rusland er ikki limur í WTO, men hevur søkt um at gerast limur. Higartil er umsóknin ikki gingin á møti, tí Rusland ikki uppfyllir settu treytirnar fyri fríhandli, serliga er tað á landbúnðarøkinum, at kravt verður at Rusland letur seg upp. Rusland hevði kanska rokna við at kunna tinga seg til sættis og her var tað umráðandi at fáa USA við í sín part, men leikurin eydnaðist ikki. Somuleiðis bleiv støðan við WTO og manglandi framburðinum tikin upp, og hava G8 londini sett eina freist á ein mánaða at fáa semju um WTO leistin.

### Føroyar og Rusland

Við føroyskum eygum er bæði WTO og G8 í mun til Rusland áhugavert. Føroyar hava í nógv ár havt fiskivinnusamstarv við Rusland, og í nakað nógv ár hevur ein næstan klár fríhandilsvtala við Rusland ligið at kalla klár. Fyri kortum bleiv ein avtala við Rusland gjørd, soleiðis at russiski tollurin á føroyskum vørum bleiv settur niður í helvt. Fríhandilsavtalan Føroyar hava arbeitt við at fingið í lag við Rusland, var ein av teim fyrstu fríhandilstilgongdunum Rusland fór í gongd við. Nú verður neyvan komið á mál fyrrenn Rusland gerst limur í WTO, soleiðis at ein fríhandilsavtalan kann gerast eftir einum WTO leisti. Um vit taka atlit til fundirnar Bush og Putin høvdu um júst henda spurning, so skal Rusland gera nakrar broytinar áðrenn WTO limaskapurin gerst veruleiki.

### WTO og G8 londini

Aðalstjórin í WTO, Pascal Lamy, legði heldur ikki fingrarnar ímillum, tá hann á G8 fundinum vísti á hvussu stóra ábyrgd júst hesi londini hava fyri at Doha semjan verður veruleikagjørd, soleiðis at forðingar verða tiknar av í heimshandlinum, tí at 85% av heimsins BTÚ og 75% av heimshandlinum er í G8 londunum. Tí heitti hann á stjórnarleiðararnar um at geva sínum ráðharrum rásarúm at fáa eina semju á hesum økjum

### Samanumtikið

Hesin G8 fundurin var áhugaverdur. Eitt var eirindarleysi dómurin frá WTO aðalskrivaranum, sum legði ábyrgdina fyri framburði á heimsins fríhandli á herðarnar á hesum londum. Tað hevur kanska havt sína ávirkan. G8 londini komu ásamt um at fáa trupulleikan loystan tann komandi mánaðan. Fyri Føroyar var tað áhugavert at vita um Rusland slapp inn í WTO familjuna soleiðis fyri at fáa fríhandilssáttmálan við Ruslan undir land. Eisini stríðið fyri at fáa londini at semjast um og seta í verk semjurnar frá Doha hava áhuga, tí hetta viðførur at heimshandilin gerst frælsari í sjálvum sær og tað kann Føroyar bara vinna við.




Vika 29
2005

Marknaðarrák

# Miðeystur trýstir marknaðirnar

Ófriðurin í Miðeystri hevur havt størst ávirkan á alheims figgjarmarknaðir seinastu vikurnar. Eftir at Ísrael fór undir at bumba støðir í Libanon, hevur eisini iranska stjórnin blandað seg í stríðið. Av tí at Iran er millum størstu oljuframleiðarar í heiminum, hevur stríðið ávirkað oljuprísirnar. M.a. nærkaðist Brentoljan 78 dollarum fyri tunnuna í seinastu viku. Hetta er met og Brentoljan er tískil hækkað um 30% í ár. Hetta er sera nógv, tá hugsað verður um, at Brent oljan herumframt hækkaði 46% í fjør. Sum ein avleiðing av hækkandi oljuprísinum, eru lánsbrævarenturnar og partabrøvini lækkaði. Týðindi um, at Ísrael er til reiðar at fáa í lag vápnahvíld, hevur tó steðgað gongdini nakað. Sum heild hava partabrøv kortini ikki kastað nakað serligt av sær í ár, meðan lánsbrøv higartil hava givið hall, orsakað av hækkandi rentunum.

### Lánsbrævarentur lækkaðar

Lánsbrævarenturnar lækkaðu 0,1% stig í seinastu viku, men higartil hava renturnar verið støðugar hesa vikuna. Orsøkin er lítli møgulleikin fyri eini vápnahvíld í miðeystri. 10 ára rentan er nú 4,04%.

### Týðandi fartelefonroknskapir

Stóru fartelefonframleiðarnir Nokia, Ericsson og Motorola kunngerða roknskap hesa vikuna. Kaupthing væntar m.a. at Nokia fer at uppmeta samlaðu fartelefonsøluna og at roknskapurin fer at vísa á góð sølutøl, nú útboðið av Nokia telefonum er breiðkað munandi.

### Hesa vikuna

Umframt fartelefonfeløgini kunngerða m.a. IBM, Apple, Intel, Microsoft og fleiri norðurlendskir bankar týðandi roknskapir. Roknskapargóðskan hevur higartil verið ymisk; tískil verður hendan vikan sera týdningarmikil fyri komandi partabrævagongdina. Eisini sera týðandi prísvakstrartøl verða kunngjørd. Hesi verða m.a. avgerandi fyri, um fleiri rentuhækkingar verða í USA. Ein ábending kann eisini fáast um hetta mikudagin tá Fed stjórin, Bernanke, heldur røðu. Tískil er ein spennandi vika fyri framman, hóast summarfriðurin valdar.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 595,84 | 1,7% | ↑ |
| JPY | 5,08 | -0,9% | ↓ |
| GBP | 1.083,42 | 0,4% | ↑ |
| NOK | 94,17 | 1,0% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,49 | 0,2% | ↑ |
| | | | |
| Norrøn Partabrøv | 104,11 | -4,0% | ↓ |
| | | | |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*